umhvørvisstovan

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN
Føroyar

Argir hin 11. november 2019
Málsnr.: 19/00602-10
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Ingvard Fjallstein

**Viðvíkjandi: Góðkenning av umhvørvisárinsmeting fyri vindmyllur í Heimara Parti í Porkeri**

Umhvørvisstovan góðkennir hervið, sambært § 16, stk. 1 í elveitingarlógini[1], umhvørvisárinsmeting fyri 7 vindmyllur hjá Elfelagnum SEV í haganum Heimari Partur, matr. nr. 242 í Porkeri.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisárinsmetingini er at tryggja, at ávirkanin av verkætlanini á náttúru, umhvørvi og onnur viðurskifti er væl lýst, so at sleppast skal undan óvæntaðum avleiðingum av verkætlanini.

## 2. Umsókn og málsviðgerð

SEV sendi hin 19. juni 2019 Umhvørvisstovuni umhvørvisárinsmeting til verkætlan at seta sjey vindmyllur upp í haganum Heimari Partur.

### 2.1 Lýsing av verkætlanini

SEV ætlar at seta sjey vindmyllur av slagnum Enercon E-44, við einum samlaðum mátti upp á 6,3 MW, í Heimara Part. Myllurnar eru 45 metrar høgar, veingjabreiðið er 44 metrar, og tær fara at standa á betongfundamentum. Við hvørja myllu verða 1.100 $m^2$ av lendi tiknir til fundament og arbeiðsøki. Tilsamans verða 17.700 $m^2$ av lendi brúktir til vegagerð og mylluøkir. Vindmyllurnar standa í 2-300 metra hædd.

Myllurnar standa umleið 1,5 km vestur frá landsvegnum um Porkerisháls, eftir høvdini frá Øktarhóli ovara og vestur móti Høddalsryggi. Báðu megin vindmyllulundina er lendið vátt við nógvum kjarnum. Vegur verður gjørdur frá boganum í landsvegnum norðan fyri Porkerisháls niðan til vindmyllulundina.

Staðsetingin av myllunum er broytt nakað, síðani kanningin varð gjørd í 2015, sum ger, at myllurnar fara at standa longri frá norðaru vøtnunum, meira enn 300 metrar. Teinurin til sunnaru vøtnini verður nakað tann sami, meira enn 400 metrar. SEV hevur ætlan um at seta seks líknandi vindmyllur upp afturat seinni, sum framhald av verandi verkætlan.

Tað eru umleið 1,5 km frá eystastu mylluni til næstu húsini í Porkeri og 1,8 km til næstu húsini í Hovi.

Ein óheft náttúrulýsing er gjørd av økinum í 2015 og endurskoðað í 2019.

---

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni, við seinni broytingum.

## 2.2 Umhvørviaárinsmeting

SEV hevur skrivað eina umhvørvisárinsmeting fyri verkætlanin. Árinsmetingin viðgerð m.a. hvussu verkætlanin væntast at ávirka á djóra- og plantulívið á staðnum, og hvussu vindmyllurnar síggjast í landslagnum, umframt ampar av óljóði og skuggakasti. Útrokningar vísa, at vindmyllurnar lúka donsku markvirðini fyri óljóð, og at eingin vandi er fyri skuggakasti í bygdum øki. Harafturat eru myllurnar smurdar við máling, sum minkar munandi um afturkast av sólarljósi.

Lendið er vátt við turrari heyggjum. Nógv vøtn og tjarnir eru norðanfyri, har ætlanin er at seta vindmyllulundina, umframt at vøtn og tjarnir eisini eru sunnanfyri. Flestu planturnar eru vanligar í føroyskum haga, men tað eru eisini plantur, sum bara vaksa her og har, ella eru sera sjáldsamar. Skordjórakanningarnar vístu, at flestur klukkurnar vóru vanligar vátlendisklukkur í Føroyum. Harafturat vóru nógv sløg mýggjabitum.

Í økinum reiðrast 17 fuglasløg, tilsaman eini 60-70 pør, harímillum sløg sum eru hótt ella sera hótt. SEV vísir til kanningar, sum vísa, at fuglameingið kann minka nærhendis vindmyllum og fuglur kann doyggja av at renna á vindmyllur. Samstundis vísir SEV til nýggja kanning í Húsahaga, ið ikki bendir á, at búfuglameingið er minkað samanborið við, tá vindmyllurnar vórðu settar upp, og lítið bendir á, at fuglur verður skaddur ella doyr av samanstoyti við vindmyllurnar. Kanningin varð gjørd í Húsahaga í 2017 og 2018.

Vegurin frá landsvegum og niðan til vindmyllurnar kann turka partar av lendinum nakað, men ætlanin er, at vatn skal sleppa undir vegin, har tað annars náttúruliga samlar seg. Annars staðfestir Umhvørvisstovan út frá loftmyndum, at lendið í niðara parti av økinum longu er veitt ymsar vegir fyri meira enn 10 árum síðani. Uppi við myllurnar verður ikki mett, at vegagerðin broytir vætuna í lendinum munandi.

Tað fer at síggjast lítið til vindmyllulundina úr Porkeri, meðan allar sjey myllurnar fara at síggjast væl úr Hovi.

## 2.3 Hoyring

Hin 10. juli 2019 varð umhvørvisárinsmetingin send til almenna hoyring við lýsing í bløðunum og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni. Freistin at koma við hoyringarsvari var 15. august 2019.

Umhvørvisstovan fekk ongar viðmerkingar til hoyringina, men stovnurin setti SEV nakar ískoytisspurningar, sum SEV hevur svarað nøktandi.

## 3. Avgerð

Umhvørvisstovan góðkennir umhvørvisárinsmetingina hjá SEV frá juni 2019.

Treytin fyri hesari góðkenning er, at verkætlanin verður framd, sum greitt er frá í umhvørvisárinsmetingini, umframt:

- at vegurin niðan til myllurnar verður lagdur soleiðis at hann turkar lendið niðan fyri vegin so lítið sum gjørligt,

- at vegurin til myllurnar verður stongdur fyri almennari ferðslu, tá byggiarbeiðið er liðugt,
- at SEV skipar fyri, at hótt og sera hótt fuglasløg ella sjáldsom plantusløg verða órógvað minst møguligt, meðan arbeitt verður. SEV sendir Umhvørvisstovuni eina ætlan um, hvussu hetta verður gjørt, áðrenn arbeiðið byrjar.

SEV kann seta upp til seks vindmyllur afturat upp í Heimara Part, um staðsetingin er í beinleiðis framhaldi av verandi ætlan. Um ikki skal nýggj umhvørvisárinsmeting gerast og góðkennast, áðrenn SEV hevur gjørt bindandi avtalur at keypa vindmyllur.

Raksturin av vindmyllulundini krevur umhvørivgóðkenning sambært § 26 lóg um umhvørvisvernd. Umhvørvisgóðkenningin skal vera góðkend, áðrenn byggiarbeiðið byrjar.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um neyðugt er við øðrum góðkenningum sambært aðrari lóggávu.

**4. Eftirlit**

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytir í hesi góðkenning verða hildnar.

**5. Kæra**

Henda avgerð kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast til Umhvørvisstovuna, sum sendur kæruna til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí at avgerðin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 11. desember 2019.

Suni Petersen, deildarleiðari / Ingvard Fjallstein, málsviðgeri

**Avrit:** Elveitingareftirlitið, Umhvørvisstovan, Traðargøta 38, FO-160 Argir
Porkeris kommuna, við Á 8, FO-Porkeri